**Ingolf S. Olsen**
**løgtingsmaður**

**Nr. 62/2018**

**Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a**

**Fyrispurningur um frítøku at rinda eftirløn, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Kristinu Háfoss (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

1. Hví kann ein føroyingur, sum starvast í Noregi og har er fevndur av Folketrygden, eftir umsókn ikki verða frítikin at rinda til eftirløn sambært § 1, stk. 9 í eftirlønarlógini?
2. Føroyingar, ið rinda inn til Folketrygden, kunnu draga inngjaldið frá í føroysku sjálvuppgávuni. Eru fíggjarligar avleiðingar annars fyri hin einstaka og/ella land og kommunur, um hesir fram eftir verða frítiknir at rinda til eftirløn sambært § 1, stk. 9 í eftirlønarlógini?
3. Hvussu nógvir føroyingar, sum eisini eru fevndir av Folketrygden, rinda inn til føroyska eftirløn?

**Viðmerkingar:**
§ 1, stk. 9 í eftirlønarlógini ásetir, at persónar, ið eru fevndir av eftirlønarskipan uttanlands sum partur av arbeiðssáttmála við arbeiðsgevara við heimstaði uttanlands, og har arbeiðið verður útint uttan fyri Føroyar, kunnu verða undantikin at rinda til eftirløn eftir føroysku eftirlønarlógini.

Fíggjarmálaráðið hevur í kunngerð nr. 165 frá 19. desember 2013 millum annað ásett, at treyt fyri undantøku er, at persónurin kann vátta, at hansara starvsviðurskifti gera, at hann ikki sjálvur kann velja at rinda til føroyskan eftirlønarveitara, og at hansara eftirlønarskipan er nøktandi. Tá landsstýrismaðurin í fíggjarmálum legði uppskotið um eftirlønarlógina fyri tingið í mars 2013 varð dentur lagdur á í almennu viðmerkingunum, at samansparingin skal tryggja, at fólk í størri mun fíggjarliga klára at forsyrgja sær sjálvum, tá tey gerast pensjonistar.

Fyri tey, sum arbeiða uttanlands fyri útlendskan arbeiðsgevara, er galdandi, at uttanlandsinntøka er fevnd av eftirlønargjaldinum. Men fleiri teirra eru fevnd av eftirlønarskipanum, har tey arbeiða. Í uppskotinum í 2013 varð staðfest, at tað ikki ber til at áleggja útlendskum eftirlønarfeløgum at fylgja føroysku eftirlønarlógini, og tað heldur ikki er rætt at áleggja persónum at rinda til føroyska eftirløn afturat einari kravdari útlendskari eftirlønarskipan.

Skotið varð tí upp við ávísum treytum, at hesir persónar kunnu verða undantiknir føroysku eftirlønarlógini við atliti at teirri inntøku, ið er fevnd av útlendskari eftirlønarskipan.

Sambært norðurlendsku konvensjónini um almannatrygd skulu arbeiðstakarar vera tryggjaðir í arbeiðslandinum.

Føroyingar, sum arbeiða í Noregi ella sigla við norskum skipum, skulu sostatt vera tryggjaðir í Noregi, har teir tá verða fevndir av Folketrygden. Aldurseftirløn er partur av Folketrygden, og hon lýkur treytirnar í eftirlønarlógini um at vera lívrenta, sum verður útgoldin, tá

viðkomandi fer frá við eftirløn. Støddin á eftirlønini fylgir inntøkuni, meðan arbeitt verður, og tí verður minst líka nógv spart saman í Folketrygden, sum eftir føroysku eftirlønarlógni.

Tá hesir føroyingar á hesum grundarlag tykjast at uppfylla treytirnar væl og virðiliga um samansparing til eftirløn í starvi teirra uttanlands (í hesum føri í Noregi), verður landsstýrismaðurin biðin um at svara, hví føroyingar, sum spara saman til eftirløn í Folketrygden í Noregi ikki kunnu verða frítiknir at rinda til eftirløn sambært § 1, stk. 9 í eftirlønarlógini.

**Á Løgtingi, 1. mai 2019**

Ingolf S. Olsen